

## Minnast Mikkjal

Í morgin, 20. oktober, eru 50 ár liðin, síðani skaldið Mikkjal á Ryggi doyði, og í tí sambandi skipar Vága Dansifelag fyri kvøldsetu í annaðkvøld kl. 20. Kvøldsetan verður í Beitinum í Miðvági, har Mikkjal á Ryggi varð føddur og vaks upp. Á kvøldsetuni verður ymiskt hjá skaldinum lisið upp, nakrir av sangum hansara verða sungnir, og farið verður eisini upp á gólv. Ein ljósmyndarøð frá einari láttraferð er eisini á skránni.

## Aftur bókakafé

Tær væl umtóktu bókakaféirnar á Hafnia Lounge byrja ú aftur. Tann fyrsta í hesum umfari verður mikudagin 25. oktober . Tá fer Elin Mortensen at hugleiða um bókina „Ung undir krígnum“, og Unn í Dali fer at lesa úr egnum yrkingum. Bókadeild Føroya Lærarafelags verður eisini á bókakaféini mikudagin, og har fer eitt umboð fyri deildina at greiða frá virkseminum. Tað eru Kunningarstovan og Hotel Hafnia, ið skipa fyri.

## Fiskimenn og ALS

Tað hevur mangan verið frammi, at fiskimenn hava ov vánaligar sømdir í Arbeiðsloysisskipanini.

Víst hevur serliga verið á, at tá ið skip liggja ávísar tíðir, fáa fiskimenn ikki eitt oyra úr ALS, hóast teir onga inntøku hava

Vanligastu orsøkirnar til, at skip liggja, er, at tey eru á beding og til eftirlit, men tað kann eisini vera at tey verða løgd fyri fiskaloysi.

Undir hesum umstøðum fáa fiskimenn onki frá ALS, hóast teir ganga fyri onki í langa tíð.

Fyri at fáa útgjald úr ALS, skal fiskimaður verða beinleiðis uppsagdur og hann skal eisini vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum og sostatt eisini til reiðar at átaka sær eitt hvørt arbeiði, sum ALS ávísir honum.

Tað hevur frammi at fiskimenn hava alt ov vánaligar umstøður í ALS, tí hildið verður, at tað er órímiligt, at teir ikki kunnu fáa útgjald úr skipanini, tá ið teir eru noyddir at ganga í landi í langa tíð av tí at skipið liggur av einhvørjari orsøk.

Seinastu royndina at bøta um umstøðurnar hjá fiskimonnum í ALS, gjørdi Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, tá ið hann í vár legði uppskot fyri Løgtingið.

Í uppskotinum vildi hann hava Løgtingið at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta lógina um ALS, so at fiskimenn eisini kundi fáa útgjald úr skipanini, tá ið teir onga inntøku høvdu av tí at skip teirra liggur í eina tíð.

Men meirilutin í løgtinginum vildi ikki heita á Landsstýrismannin um at leggja uppskot fyri tingið um at beinleiðis at broyta lógina.

Ístaðin samtykti Løgtingið eina bleytari orðing sum segði, at heitt varð á Landstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, um at virka fyri at finna eina loysn upp á trupulleikarnar hjá fiskimonnum, so at teir kunnu fáa útgjald frá ALS, tá skip teirra liggur.

Men sum tað sæst á øðrum greinum her á síðuni, letur tað seg ikki gera uttan víðari.

# Ólógligt at geva fiskimonnum betri sømdir í ALS

**– Løgfrøðingur hevur staðfest, at sum støðan er nú, er tað ólógligt at geva fiskimonnum betri sømdir í ALS**

ALS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Soleiðis sum lógin á ALS er í løtuni, er tað ólógligt at geva fiskimonnum betri sømdir í arbeiðsloysisskipanini.

Tað staðfestir ein løgfrøðilig niðurstøða, sigur nevndarformaðurin í ALS, Alfred Petersen.

Tað hevur mangan verið frammi, at fiskimenn hava alt ov vánaligar sømdir í arbeiðsloysisskipanini.

Tað seinasta, sum er hent í hesum sambandi, er, at Løgtingið samtykti í vár at heita á Landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, um at virka fyri at finna eina loysn, so at virka fyri, at finna eina loysn upp á trupulleikarnar hjá fiskimonnum, so at teir kunnu fáa útgjald frá ALS, tá skip teirra liggur.

– Men hetta ber ikki til, soleiðis sum støðan er nú, tí tað er í stríð við lógina, sigur nevndarformaðurin í ALS.

### Niðurstøðan er greið

Hann sigur, at í sambandi við samtyktina í Løgtinginum í vár, varð løgfrøðingurin hjá ALS biðin um at gera eina løgfrøðiliga niðurstøðu í málinum.

– Og niðurstøðan hjá honum er púra greið: Soleiðis sum lógin í ALS er nú, er ikki heimild til at gera eina skipan, sum gevur fiskimonnum betri sømdir í ALS, sigur Alfred Petersen.

Hann vísir á, at sum er, eru fiskimenn í ALS sum er og fáa útgjald úr skipanini, tá ið teir verða uppsagdir og eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum og sostatt eisini kunnu átaka sær eitthvørt arbeiði, sum ALS ávísir teimum.

Men sum lógin er orðað nú, ber ikki til at gera eina serliga skipan fyri fiskimenn, sum ger, at teir eisini kunnu fáa útgjald, tá ið skipið hjá teimum av onkrari orsøk verður lagt í eina tíð.

Í hesum sambandi verður eisini víst á, at tá ið ein serlig skipan skuldi gerast fyri fiskafólk á landi, mátti lógarbroyting til.

Og tað sama er galdandi, skal ein serlig skipan gerast fyri fiskimenn, staðfestir løgfrøðingurin hjá ALS.

Alfred Petersen sigur, at stýrið fyri ALS hevur tikið niðurstøðuna hjá løgfrøðinginum til eftirtektar og hevur sent svarið víðari til Vinnumálaráðið.



*Vilja politikarar hava, at fiskimenn skulu fáa betri sømdir í ALS, er bara eitt at gera og tað er at fáa Løgtingið at broyta lógina*

# Gera onki við fiskimenn og ALS enn

**Skulu fiskimenn hava betri sømdir í ALS, má tað umhugsast sera gjølla og tað hava vit ikki arbeiðsorku til beint nú, sigur Bjarni Djurholm**

ALS OG FISKIMENN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fyribils verður onki gjørt fyri at geva fiskimonnum betri umstøður í ALS.

Tað staðfestir Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann hevur merkt sær niðurstøðuna hjá ALS um, at skulu fiskimenn hava serliga sømdir í skipanini, krevst lógarbroyting.



*– Fiskimenn mugu bíða eftir betri sømdum í ALS, tí arbeiðsorkan í Vinnumálaráðnum røkkur ikki til, sigur Bjarni Djurholm*

– Og tað hava vit ikki arbeiðsorku í Vinnumálaráðnum til at fara undir í løtuni, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at tá ið Vinnumálaráðið fekk niðurstøðuna frá ALS, varð longu ein listi gjørdur yvir tey mál, sum ætlanin er at gremja í næstum.

Og Bjarni Djurholm sigur, at tann listin verður framvegis raðfestir og av tí, at svarið frá ALS ikki var komið, tá ið listin var gjørdur, er spurningurin um ALS og fiskimenn ikki á listanum.

Og listin verður ikki broyttur, tí so má okkurt av málunum leggjast á hyllina av teimum, sum vit frammanundan høvdu sett okkum fyri at fremja, sigur hann.

– Hetta er heilt einfalt ein spurningur um arbeiðsorku, leggur hann afturat.

Tí verður tað ikki fyrrenn í hvussu so er eftir jól, at spurningurin um fiskimenn og ALS kann takastr til viðgerðar.

Og Bjarni Djurholm ásannar, at hetta er ikki eitt mál, sum er einfalt at loysa.

Tvørturímóti er talan um eitt sera prinsipielt mál, tí skulu fiskimenn hava serliga skipan, kann henda, at eisini aðrir bólkar fara at krevja sersømdir.

Men eftir hansara fatan, er politiskur vilji til at taka umstøðurnar hjá fiskimonnum í ALS til viðgerðar.

- Í hvussu so er, er vilji til at broyta viðurskiftini lutvíst, men eg ivist í, at vilji er til at gera so stórar broytingar, sum nøkur hava hug til.

– Spurningurin, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa, verður støðan hjá fiskimonnum broytt. Tað er eitt mál, sum kann skapa fordømi, so at eisini aðrir bólkar fara at krevja serligar sømdir og tí skulu broytingar umhugsast sera gjølla, sigur Bjarni Djurholm.

Tað var eisini orsøkin til, at Løgtingið í vár ikki vildi heita á landsstýrismannin um at broyta lógina, men einans vildi heita á hann um at virka fyri at finna eina loysn.